# Bilar

Nr. 151 • hósdagur • 12. august 2004 • 78. árg.



*Suzuki Ignis er sportsbilur við t.d. hvítum 15" alufelgum, takspoilara aftan og komplettum spoilarasetti og sportsútstoyti sum ger at hann ljóðar sum ein veruligur sportsbilur*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Við Ignis 1,5 Sport hava Suzuki gjørt eina "gøtuútgávu" av rallybilinum, sum vann fleiri sigrar í VM-Rally 2003. Bilurin koyrir frá 0-100 upp á 8,9 sek*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Rallybilur frá Suzuki

**Suzuki eru komnir á marknaðin við eini sportsligari útgávu av rallybilinum Ignis 1,5 Sport, sum hevur staðið seg væl í VM-Rally 2003. Við tunaðum motori og Close-ratio girkassanum er bilurin eitt spennandi tilboð í GTI-klassanum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson, maggi@sosialurin.fo*

Við Ignis 1,5 Sport hava Suzuki gjørt eina "gøtuútgávu" av rallybilinum, sum vann fleiri sigrar í finsku og walisisku deildini í VM-Rally 2003.

Bilurin er eitt beinleiðis úrslit av, at Suzuki hava luttikið í VM-Rally. Hann er gjørdur við tí endamáli at geva bilføraranum eina uppliving av, hvussu tað er at koyra ein rallybil.

Í mun til ein vanligan Ignis er her talan um ein heilt annan bil við t.d. hvítum 15" alufelgum, takspoilara aftan og komplett spoilarasett runt um allan bilin, lyktum við bláum reflektorum, og sportsútstoyti sum ger at hann ljóðar sum ein veruligur sportsbilur. Innan eru Recaro-setur við gulum neti í nakkapútunum, leðurratt og girknøtt, og hvít instrumentir við bláum ljósi.

Umframt sportsundirvognin hevur bilurin skivubremsur við øll fýra hjólini.

Designið er smart, bilurin sær sportsligur út, og hann er kvikur og góður at koyra.

Motourin er ein 1,5 litur VVT 16V við 109 hk, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 8,9 sek. Close-ratio girkassin ger at motorurin verður fult gagnnýttur.

Bilurin hevur ABS bremsuskipan við EBD (elektroniskum bremsukraftdeilara), og hóast talan er um ein sportsbil, hevur hann t.d. el-síðurútar framman, el-síðuspegl og fjarstýrt sentrallás.



*Innan eru Recaro-setur við gulum neti í nakkapútunum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

SUZUKI

**Suzuki Ignis 1,5 Sport**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,5 litur VVT 16V bensin 109 hk |
| 0-100 km/t | 8,9 sek |
| Bensinnýtsla | 14,5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 185/55-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 362,0 cm |
| Breidd | 165,0 cm |
| Hædd | 152,5 cm |
| Eginvekt | 900 kg |
| Prísur | kr. 169.990,- |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur 1-3<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel.313535 |





*Ignis er eisini sportsligur innan við leðurratti og girknøtti og hvítum instrumentum við bláum ljósi.*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# VW Concept C



*Concept C sum cabriolet. Pláss er til fýra vaksin í bilinum*

**Tá VW fyrstu ferð sýndu fram nýggja Concept C á bilaframsýningini í Geneve í mars, var áhugin so stórur, at avgerð nú er tikin um at framleiða bilin, sum kemur á marknaðin í 2006**

BILAR
*Magnus Gunnarsson, maggi@sosialurin.fo*

VW Concept C er ein sokallaður CC ella Coupé-Cabriolet. Tað vil siga, at bilurin eftir fáum sekundum kann gerast um frá coupé til cabriolet ella øvugt. Sum coupé hevur bilurin innbygt sóltak, og viðførisrúmið er upp á 400 litrar.

Concept C er ein lutfalsliga breiður bilur, mátini eru: Longd 441,0 cm, breidd 181,0 cm og hæddin er 143,0 cm sum coupé. Talan verður um ein fýra persónabil við framúr góðum koyrieginleikum.

Motorurin verður upp á 150 hk við FSI tøkni. Designið er tað nýggjasta frá VW við t.d. kølaragittari úr aluminium, og forlyktum sum koma at verða eitt sereyðkenni fyri VW í framtíðini.

Concept C var uppruna-liga sýndur fram sum ein konseptbilur, men áhugin var so stórur, at bilurin nú skal framleiðast á eini Volkswagen verksmiðju í Portugal, sum er ein av mest framkomnu bilverksmiðjum í Evropa við 3.100 starvsfólkum. Eftir ætlan kemur bilurin á marknaðin fyrsta kvartal í 2006.



*VW Concept C er ein sokallaður Coupé-Cabriolet, sum eftir fáum sekundum kann gerast um frá coupé til cabriolet ella øvugt*





*Smart design. Sum coupé hevur Concept C innbygt sóltak*

## Subaru 50 ár



Í ár eru liðin 50 ár, síðan Subaru fóru at gera bilar. Japanska fyritøkan byrjaði sum flogverksmiðja í 1917 og í 1946 gjørdu teir sín fyrsta skutara. Í 1954 varð fyrsti bilurin gjørdur, ein Subaru P1.

*Kelda: Subaru International Motors*

## Rover bilar í 100 ár



Rover bilar hava nú verið gjørdir í 100 ár. Enska Rover verksmiðjan varð stovnað í 1877 sum ein seymimaskinuverksmiðja, síðan fór teir at gera súkklur. Í 1903 gjørdu teir sína fyrstu motorsúkklu, og í 1904 koyrdi fyrsti bilurin út av verksmiðjuni í Coventry

*Kelda: Rover Danmark A/S*

## Rolls-Royce í 100 ár



Í ár eru liðin 100 ár síðan Charles S. Rolls og Frederick H. Royce í Onglandi gjørdu fyrsta Rolls Royce bilin. Í dag er Rolls-Royce Motor Cars Ltd. eitt dótturfelag hjá týsku BMW-koncernini

*Kelda: Motor Magasinet*